TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## ÚTBJÓÐING

Tórshavnar kommuna bjóðar hervið um- og útbygging av Kollafjarðar skúla út í almennari arbeiðstøku.

Arbeiðið umfatar at útbyggja skúlan við tilsamans umleið 950 fermetrum, umframt umbyggingar av verandi skúla.

Byggingin verður boðin út í fakarbeiðstøkum:

**A. Inniloking**

**B. Gólvarbeiði**

**C. Málaraarbeiði**

**D. HVS- og ventilatiónsarbeiði**

**E. El-arbeiði**

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast hjá MAP Arkitektum á tlf. 351900 innan 2. apríl móti veðhaldi á 20.000 kr, sum verður at gjalda á konto í Føroya Banka nr. 6460 168.128.3.

Viðmerkjast skal, at arbeiðsfrágreiðingar verða útflýggjaðar á fløgu. Frágreiðingarnar kunnu lesast við telduforritinum Acrobat Reader. Allar tekningar eru tó á pappíri.

Lisitatiónin verður fríggjadagin 14. mai kl. 14 í býráðs-salinum. Tey, sum boðið hava, kunnu vera hjástødd, tá ið boðini verða latin upp.

**Høvuðsráðgevi og projektleiðsla:**

MAP Arkitektar sp/f, Niels Finsens gøta 31, FO 100 Tórshavn

**Konstruktiónir:**

Sp/f Verkfrøðingastovan FRI, Mannbrekka 18, FO 100 Tórshavn

**HVS og ventilatión:**

P/f Sofus M. Jakobesen FRI, J.H. Schrøters gøta 22, FO 100 Tórshavn

**El:**

KJ- Elráð, Undir Brúnni 30, FO 700 Klaksvík

SNARSKIVAN



Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## SKEIÐ
### í at leggja natúr- og betongsteinar

Skeiðið er ætlað fólki, ið arbeiða við álegging av natúr- og betongsteini. Á skeiðnum læra luttakararnir meginreglurnar fyri álegging, og hvussu arbeiðið kann gerast.

**Innihald:**
- Undirlagið
- Teknikkir og mynstur
- Normar og krøv
- Verkligt arbeiði við betong- og chaussésteini

**Tíð:** Mikukvøldið 5. mai kl. 19.00-22.00
Hóskvøldið 6. mai kl. 19.00-22.00
Leygardagin 8. mai kl. 09.00-16.00

**Stað:** Tekniski Skúli,Timburdeildin, Smiðjugerði
**Skeiðl.:** Michael K. Jacobæus
**Kostn.:** 3.100, 00 kr. íroknað frálæru, tilfar og mat
**Tilm.:** **Áðrenn 21. apríl 2004**

team85 • 358000

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374,
info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo

## Bilar til sølu

**SsangYong Rexton RX290 4WD *"7 setur"***



prísur **290.000,-**

· Árgang 2003 · km 22.500 · Aut. gear · 2,9 Turbo diesel intercooler · Automatiska í- og úrkoblan av 4WD · Centrallás · Fjarstýrdan lykil · Tónaðar rútar · Krók · Lættmetalfelgur við dekkum · Pioneer anlegg við fløguspælara · Vælhildin

Sosialurin 341800

**Citroen Jumpy 2,0 TD Vørubilur**



prísur við mvg **120.000,-**

· Árgang mai 1998 · Km 80.000 · Radio, el-rútar, nýlakkeraður, í sera góðum standi.

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 51 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

## Bilur til sølu

Mitsubishi Pajero jeepur frá 5/1995, 4-hjólstrekk, til sølu fyri 70.000 kr.

**SEV**
Att.: Jørleif Vang
Tlf. 346820
Tórshavn

## Hagafundur

Hagafundur fyri Innasta haga í Skálavík verður á Keldu leygarkvøldið 3. apríl kl. 19.00.

Skrá: Útbygging av rættini.

**Hagastýrið**

## Starv sum umsitingarleiðari

Nú umsitingarleiðarin á Føroya Sjómansskúla fer í annað starv, verður søkt eftir nýggjum umsitingarleiðara frá 1. mai 2004.

**Vit kunna bjóða:**
- Eitt spennandi starv í einum sera góðum umhvørvi, bæði tá tað snýr seg um karmar og samstarv ímillum leiðslu, umsiting, lærarar og næmingar.

**Starvs- og ábyrgdarøkir:**
- Bókhald og fíggjarstýring.
- Skráseting og journalisering
- Viðlíkahald av teldukervi. Administrator.
- Umframt vanligt skrivstovarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Skrivstovuútbúgving við hóskandi eftirútbúgvingum.
- Hægri Handilsskúla ella líknandi og/ella hollar starvsroyndir.
- Teld á høgum førleikastigi. Kunnleika til dátu-básubygnað.
- Kunna vera netfyrisitari.
- Hava góðar samstarvseginleikar.

**Setanarviðurskifti:**
- Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggj-armálaráðið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir skulu sendast til

**Føroya Sjómansskúla,**
Nóatún 2,
Postboks 104,
FO-110 Tórshavn,

í seinasta lagi mikudagin 14. apríl 2004.

## Aðalfundur
### hjá Fosturforeldrafelagnum

Fosturforeldrafelagið hevur aðalfund á Tórshavnar Sjómansheimi leygardagin 3. apríl 2004 kl. 9.30. Skrá sambært lóg felagsins.

Eyðun Joensen heldur fyrilestur um evnið: Fostur-umsorgan/vansar.

**Nevndin**

## Nýtt telefon-nummar

Økisdeildin í Suðuroy hevur fingið nýtt telefon- og faxnummar
Telefon **353560**
Fax **353561**

**Almannastovan**

FØROYA LANDSSTÝRI

**Almanna- og heilsumálaráðið**

## Leiðari til Sjúklingahotellið Tórshavn

Av tí at leiðarin á Sjúklingahotellinum Tórshavn, hotellinum fyri føroyskar sjúklingar og avvarðandi í Keypmannahavn, hevur valt at taka av nýggjum avbjóðingum, verður við hesum starvið sum leiðari lýst leyst til setan frá 1. juni 2004 ella eftir nærri avtalu.

**Ábyrgdarøki:**
- Leiðsla, planlegging, rakstur og menning av sjúklingahotellinum
- Leiðsla av sjúklingavegleiðarafunktiónini.
- Samstarv við føroyska heilsuverkið og Almanna- og heilsumálaráðið

**Vit ynskja okkum at tú hevur:**
- Útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur, breiðar sjúkrarøktarfakligar royndir.
- Fíggjarligar, fyrisitingarligar og/ella leiðsluligar royndir/útbúgving
- Góð samstarvsevni
- Og at tú ert virkisfús og opin fyri broytingum.

Av tí at allir íbúgvar á hotellinum eru føroyingar og nógv av samstarvinum er við føroyskar myndugleikar og sjúkrahús, er tað ein fyrimunur at umsøkjarar tosa og skriva føroyskt.

**Løn - og setanartreytir:**
Starvið er flokkað við grundløn í lønklassa 45, samb. sáttmála millum DSR og Københavns Kommune, harumframt eru møguleikar fyri funktións- og førleikaløn eftir nærri avtalu ímillum Dansk Sygeplejeraad og Almanna - og heilsumálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Inu Frisdahl, leiðara á Sjúklingahotellinum, tlf. 0045 21677290, e-mail if@shfo.dk ella til Mariu á Dul, starvsfólkastjóra í Almanna- og heilsumálaráðnum, tlf. 304050, e-mail mad@hmr.fo, har starvslýsing eisini kann umbiðjast.

Umsókn við avritið av prógvum v.m. skulu sendast til:
Almanna- og heilsumálaráðið
Att. Maria á Dul
Eirargarður 2
FO -100 Tórshavn

Umsóknarfreist: 19. apríl 2004 kl. 12.00

## Haldarar hjá Sosialinum



ið ikki fáa leygardags-blaðið verða bidnir um at ringja tel 229725 leygardag millum kl. 11 og 14

**Prentmiðstøðin**

Minnist til haldara-gjaldið av Føroya besta blaði



Síðsti rættstundis gjaldsdagur er 28. mars 2004

**Sosialurin**
Arjgjavegur 26
tel 34 18 00 · fax 34 18 01
e-mail: post@sosialurin.fo

### Heimarøktin í Norðoyggjum

## Summarfrítíðar-avloysarar

Søkt verður eftir avloysarum fyri sjúkrarøktarfrøð-ingar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar frá 15. juni til 31. august 2004. Søkt verður eftir fólki sum vilja arbeiða í skiftandi vaktum.

Heimarøktin fevnir um alla heimahjálp og heima-sjúkrarøkt í Norðoyggjum, umframt 2 Eldrasambýl-ir. Arbeitt verður frá kl. 8.00 til 23.00 úti og alt døgnið í Sambýlunum.

Vegna burðarfarloyvi hjá sjúkrarøktarfrøðingi verð-ur møguleiki fyri setan til januar 2005.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn saman við aritið av prógvum, autorisation og upplýsingum um arbeiðsroyndir verður at senda til økisleiðaran í **Heimarøktini í Norðoyggj-um, Bøgøta 34, 700 Klaksvík, tlf. 457243.**

Umsóknarfreistin er 14. apríl.

## Frítíðarløn 2. mai 2004

**Frítíðarlønin verður útgoldin 2. mai 2004.**

Eigur tú frítíðarløn, fært tú eina fráboðan.

**Hevur tú flutt bústað, síðani tú seinast boðaði fólkayvirlitinum frá,** fer fráboðanin retur til Frítíðargrunnin.

Fyri at sleppa undan hesum heitir Frítíðargrunnurin vinarliga á tey, **sum eru búsitandi í Føroyum** um at fráboða fólkayvirlitinum nýggja bústaðin.

**Frítíðarlønin fyri 2004 fer inn á somu kontu sum í fjør.** Um tú ynskir hetta kontunummar broytt, verður tú biðin um at fráboða okkum nýggja kontunummarið.

Tú kanst upplýsa okkum um broytta kontunummarið við at útfylla fráboðanina niðanfyri og senda okkum hana **áðrenn 14. apríl 2004**.

Eisini ber til at fara inn á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo og útfylla oyðublaðið um frítíðarløn.

Spurningar kunnu svarast á telefon 37 10 51.
Telefonin svarar mán. - hós. kl. 9.00 - 15.30, og frí. kl. 9.00 – 15.00

| | |
|---|---|
| P-tal: | |
| Navn: | |
| Bústaður: | |
| Postnr. og bygd/býur: | |
| Peningastovnur: (bert føroyskur) | |
| Kontunummar: | |

__________ , / 2004 __________
Undirskrift

Fráboðanin skal sendast til: Toll- og Skattstovu Føroya
Suðuroyar Øki
Postsmoga 69
FO-800 Tvøroyri

## Búmerkjakapping

Hvalbiar Kommuna hevur samtykt, at kommunan skal hava eitt búmerki, og í hesum sambandi eru øll, ið hava áhuga, vælkomin at luttaka.

**Kappingartreytirnar eru:**
- Búmerkið skal lýsa sóknina.
- Teksturin »Hvalbiar Kommuna« skal vera partur av búmerkinum
- Búmerkið skal lættliga kunna kennast bæði í stórari og lítlari útgávu.
- Búmerkið skal kunna sendast gjøgnum fax.

Støddin á innsendu búmerkjunum skal vera 40 x 60 mm.

**Tíðarfreist**
Uppskot skulu vera Hvalbiar Kommunu í hendi í seinasta lagi 1. oktober 2004. Hvalbiar Kommuna tilskilar sær rætt til ikki at brúka nakað av innkomnu uppskotunum.

**Virðisløn:**
Fyrsta virðisløn er 6000 kr.
Onnur virðisløn er 2000 kr.

Tey, ið senda uppskot inn, skulu skriva navn sítt og bústað og leggja hettar í ein lítlan brævbjálva og viðmerkja hvat/hvørji uppskot viðkomandi hevur. Lítli brævbjálvin við navni og bústaði skal leggjast inn í stóra brævbjálvan, har búmerki er í.

Spurningar viðvíkjandi kappingini kunnu setast Hvalbiar Kommunu á Tel 375 033 ella Telefax 375 385.

**Hvalbiar Kommuna**
850 Hvalba · Tel 375 033 · Fax 375 385